

# Ársins trøllashow

**Trøllapætur og hansara næstu umframt Steintór Rasmussen enda menatarvikuna í Runavík sunnudagin í næstu viku**

Undanfarnu árini er vorðin siður at enda mentanarvikuna við einum stórum tiltaki, ið serliga er ætlað børnum. Í ár er einki undantak, tí Mentanarvikan 2009 í Runavík endar við einum stórum barnatiltaki.

Vit kenna øll fitta, fleirhøvdaða Trøllapætur, Trøllababy, sum bara sigur dadada og gagaga, villu Trøllaommuna, og ikki minst lítlu, garrvillu Trøllaommudidduna. Trøll kunnu tykjast ræðandi, men hesi trøllini eru góð við børn, sera fitt og ikki minst stuttlig. Hóast tað onkuntíð endar í einum lítlum hurlivasa, dámar teimum allarbest, tá ið tey sleppa at syngja og dansa saman við børnunum.

Afturat øllum trøllunum kemur Steintór Rasmussen eisini at syngja saman við børnunum, og eins og undanfarin ár, verður Bassi sjálvandi aftur á staðnum, og hann plagar altíð at hava okkurt gott við til børnini.

Tiltakið verður í ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin 15. oktober klokkan 17. Tað varar hálvan annan tíma.

# Stórt dansikvøld í Mentanarvikuni!



Legg leygarkvøldið 24. oktober av til stuttliga og hugnaliga samveru við góðum vinfólkum, tí tá skipar Mentanarvikan 2009 fyri dansi í ítróttarhøllini í Runavík.

Flestu okkara kenna góðu, gomlu slagararnar hjá Eyðuni og Terja, sum hava fingið okkum at svinga, dansa og syngja við í fleiri enn 20 ár; og vit vita, at Jens Marni og Kim eisini borga fyri góðsku. Hesir fýra hava fingið orkestur afturat sær, so tað kann ikki blíva betri!

Tiltakið kann roknast sum endabresturin av Mentanarvikuni 2009 fyri tey vaksnu; og eftir eina rúgvu av listasýningum, konsertum og øðrum framsýningum, er óivað deiligt at sleppa út at svinga træbeinið nakrar tímar.

Við tónleikarum sum Eyðuni, Terja, Jens Marna og Kim kundu fortreytirnar ikki verið betri til eitt dansandi stuttligt kvøld í Runavík. Dansurin byrjar á midnátt og endar klokkan fýra á morgni, og atgongumerki fáast við dyrnar fyri einans 180,-. So hví ikki? Fá fatur á vinunum, og hála so makan og vinfólkini við ein túr í dans í Runavík á midnátt leygarkvøldið!



